

# Skipasmiðjan søkir eftir timburmanni

Søkt verður eftir timburmanni / skipstimbrara til Timburdeild okkara, har uppgávurnar eru bæði timburarbeiði og annað fyrifallandi arbeiði.

Vit ynskja, at tú:

- Ert nærlagdur, røkin og ágrýtin
- Hevur lætt við at samskifta

Áhugað biðjast venda sær til:

**Tórshavnar Skipasmiðju P/F**
**J.C. Svarbosgøta 31**
**100 Tórshavn**

og spyrja eftir Mouritz Mohr á tel. 30 11 30 ella fartel. 50 11 30 fyri at frætta nærri um starvið.

SKIPASMIÐJAN

Tórshavnar Skipasmiðja
J.C. Svabosgøta 31
Postboks 65
110 Tórshavn

Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@faroeyard.fo
www.faroeyard.fo

*Á P/F Tórshavnar Skipasmiðju starvast um 300 fólk við at veita tænastur og sølu av eykalutum til skipaflotan og vinnuna á landi. Hesar tænastur fevna um stál, aluminium, timbur, máling, beding, mekaniskar tænastur, tekniska ráðgeving og beinleiðis søla. Skipasmiðjan hevur deildir í Tórshavn, á Skála, í Vestmanna og í Runavík.*

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

# KUNNGERÐ UM FRAMLØGU AV BYGGISAMTYKT FYRI FUGLAFJARÐAR KOMMUNU

Sambært grein 6 í løgtingslóg nr. 13. frá 21. mai 1954 við seinni broytingum verður við hesum gjørt kunnugt, at uppskot til broytingar til byggisamtykt fyri Fuglafjarðar kommunu, verður lagt fram til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá 22.01.2007 til 22.02.2007 allar gerandisdagar uttan leygardag frá kl 10 - 15.

Sambært uppskotinum verður verandi frílendi »øki I« við Bakkageilina, matr. nr. 239v og 211a broytt til bústaðarøki »øki B«.

Møgulig mótmæli móti uppskotinum og broytingaruppskot til hetta, ið skulu verða skrivlig, mugu verða býráðnum í hendi í seinasta lagi 24. apríl 2007. kl. 15.00

*Fuglafjørður 18-01-2007*
**FUGLAFJARÐAR BÝRÁÐ**

# Skrivstovulærlingur

Søkt verður eftir einum skrivstovulærlingi til skrivstovuna hjá Thomas Dam Ítrótti & Damfar.

**Starvið**
Starvið fevnir um bókhald, fakturering, tollavgreiðslu, telefon-avgreiðslu og annað vanligt skrivstovuarbeiði.
Arbeiðistíðin er mánadag til fríggjadag 8.00 – 16.00.
Løn sambært S&K.

**Krøv**
Roknað verður við, at umsøkjarin hevur HH, HF ella student prógv.

Harumframt er tað ein fyrimunir um tú:
- Kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- Hevur góð samstarvsevni.
- Ert álítandi og tekur ábyrgd av tínum arbeiði.
- Ert arbeiðssamur, røkin og fyrikomandi.

**Vit bjóða**
Eitt áhugavert arbeiðspláss í menning. Vit hava eitt gott arbeiðsumhvørvi, har tú fært møguleika fyri at seta títt persónliga merki á arbeiðið.

**Umsóknir**
Umsókn við próvskjølum, og møguligum viðmælum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi **31. januar 2007.**

ÍTRÓTTUR Damfar

Postboks 154 · 110 Tórshavn

# Rigsombudsmanden på Færøerne

Opmærksomheden henledes på, at fristen for indsendelse af ansøgninger til Dansk-Færøsk Kulturfond er fastsat til den 1. marts 2007.

Der kan gives støtte til formål indenfor teater, film, musik og kunst, bogudgivelser, visse studierejser m.m. Der gives normalt ikke støtte til nordiske konferencer, skolerejser og lign. samt egentlige uddannelsesformål.

Dansk-Færøsk Kulturfond bestyrer også »Dansk-Færøsk Samfunds studierejselegat«. Legatet består af to protioner på 10.000,- kr. Den ene portion til en studierejse til Færøerne, den anden til en studierejse til Danmark for personer mellem 18 og 30 år. Studierejsen skal have et formål, der falder inden for Dansk-Færøsk Kulturfonds formål.

Ansøgninger skal sendes til fondens sekretær, aftelingsleder Lenna Hansen, Statsministeriet, Prins Jørgens Gård 11, DK-1218 København K.

Yderligere oplysninger om Dansk-Færøsk Kulturfond kan fås ved henvendelse til sekretæren, tlf. 0045 33 92 22 31, eller til Rigsombudet, tlf. 35 12 00

FØROYA ARBEIÐARAFELAG

# Aðalfundur í Føroya Arbeiðarafelag

Ársaðalfundur Føroya Arbeiðarafelags verður **fríggjadagin og leygardagin 16.-17. mars,** í B36-húsinum í Gundadali.

Byrjað verður báðar dagar kl. 10.00.

Dagsskrá sambært lógum felagsins og lógarbroyting

Uppskot til lógarbroyting og uppskot til viðgerðar á ársaðalfundinum skulu skrivliga fráboðast nevndini og skulu verða nevndini í hendi í seinasta lagi 1. februar

**Føroya Arbeiðarafelag**

